

## Ísrael farið úr Gaza

Ísraelski herurin hevur nú fullført afturtøkuna úr Gaza-geiranum. Ein talsmaður hjá ísraelska herinum segði í morgun, at tann seinasti ísraelski hermaðurin er farin úr Gaza-geiranum. Talsmaðurin legði tó afturat, at herurin verður verandi í støðum allan vegin fram við markinum, og vit eru fyrireikaðir til alt, segði talsmaðurin. Ísraelska afturtøkan byrjaði sunnudagin, eftir at Ísrael hevði lýst vápnahvíld. Stutt eftir gjørdi Hamas tað sama. Ísraelska átakið í Gaza-geiranum vardi 22 dagar og kostaði umleið 1.300 mannalív.

## 40.000 gloymdu trygdarbeltið

Hóast tað er ein sannroynd, at trygdarbeltið kann bjarga mannalívum, eru tað framvegis nógvir bilførarar, sum koyra uttan at spenna beltið. Í fjør skrásetti danska løgreglan næstan 40.000 bilførarar, sum koyrdu bil uttan at sita í trygdarbelti. Tað vil siga, at løgreglan skrásetti meiri enn 100 tilburðir um dagin, og tølini vísa, at tað vóru serliga teir yngru bilførararnir, sum "gloymdu" beltið. Hagtølini vísa eisini, at í fjør fingu meiri enn 5.000 fólk bót fyri at koyra motorsúklu ella knallert uttan at brúka hjálm.

# Skulu ikki tosa ov nógv um kreppu



**- Eg haldi ikki, at vit skulu vera so ógvuliga fokuserað upp á tosið um kreppu. Avbjóðingar eru heilt vist fyri framman, men vit kunnu eisini gera nakað fyri, at tær ikki blíva so stórar, sum tær kunnu, um vit ikki hugsa okkum væl um, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka**

FÍGGJARKREPPA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nýggi danski hjálparpakkin er serliga ætlaður at økja um eginognina ella kapitalgrundarlagið hjá bankunum, og harvið gera tað møguligt hjá bankum, ið hava for lítið kapitalgrundarlag at halda fram, og øðrum bankum at lána út.

- Vandin hevur verið hetta seinasta árið, at bankarnir orsakað av manglandi eginkapitali hava verið noyddir at hildi aftur við útlánum. Og her miðar hesin pakkin ímóti at økja um eginkapitalin og harvið um møguleikarnar at lána pening út, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka.

Tað hoyrist javnan, at gjaldføri hjá føroysku bankunum er gott í mun til tað hjá eitt nú donskum og øðrum útlendskum bankum, og har er Janus Petersen samdur.

- Nú kann eg ikki úttala meg vegna allar føroyskar pengastovnar. Men fyri okkara viðkomandi hava vit eitt gott gjaldføri, og tað er eisini tað, man hoyrir frá øðrum, at gjaldføri er í lagi. Og tað er kanska serliga aftan á tann fyrra hjálparpakkan, at gjaldførið er batnað munandi, og tað hjálpti væl upp á hugin at seta pengar í bankar, tí hann gav statsveðhald fyri innlán og lánum hjá bankunum, sigur Janus Petersen.

### Ongan hast

Við hesum nýggja pakkanum í mun til tann fyrra, so hava bankarnir ongan skund við at taka støðu, tí hesin pakkin hevur rættiliga langar freistir.

- Fyrsta freistin er so vítt eg minnist 30. juni, og so eru aðrar freistir, sum eru longri úti í tíðini, onkur í 2010. Tað vil siga, at vit kunnu gera brúk av hesum pakkanum og taka støðu seinni, sigur Janus Petersen.

Hann sigur, at fyri teirra viðkomandi eru partar av pakkanum, sum bankin ikki hevur brúk fyri.

- Tað er serliga talan um tilskot av eginkapitali. Vit í Føroya Banka hava ein ógvuliga stóran eginkapital í mun til okkar skyldur – hálvatriðju ferð lógarkravið, sum er. So tað er ikki eginkapitali, vit hava brúk fyri, og tað er tí ivasamt, um vit fara at taka lut í júst tí partinum av pakkanum, sigur Janus Petersen.

Viðvíkjandi hinum partinum av pakkanum, sum snýr seg um statstrygd ber til at taka lut í, men tað hevur sum nevnt ongan hast at taka støðu til tað nú.

- Har koma vit at síggja tíðina eitt lítið sindur ann, sigu Janus Petersen.

### Byrjaði við subprime

Altjóða fíggjarkreppan byrjaði í USA sum tann sonevnda subprime-kreppan. Kredittfeløg lántu pening til húsakeyp, ikki altíð til fólk, sum høvdu ráð at gjalda lánini aftur.

- Tað sum so hendi var, at hesi kredittfeløg seldu lánini víðari í lánsbrøvum, sonevnd subprime lánsbrøv, til íleggjarar og bankar aðrastaðni í heiminum. Og tá so kundarnir í USA – húsarhaldini – ikki megnaðu at gjalda lánini, so fingu heldur ikki íleggjararnir sínar pengar aftur fyri lánsbrøvini, so hesir taptu nógvar pengar, nógvar milliardir, sigur Janus Petersen.

Talan var um íleggjarar víða um í heiminum, Japan, Europa og aðrastaðni eisini. Hetta førdi til, at álitið á lánsbrøvunum og bankunum reyk. Eisini álitið millum bankar reyk, og tað førdi so aftur við sær, at bankar hildu uppat at lána sínámillum.

- Hetta manglandi álitið hevur so gjørt tað, at fígging ikki hevur verið tøk hjá húsarhaldum og virkjum, og tað hevur havt stóra ávirkan á gongdina í búskapinum. Og tað hevur ført til eina ógvuliga negativa gongd, har tað bara gongur tann skeiva vegin, tí tað hevur ført við sær, at húsaprísirnir eru minkaðir, og harvið er álitið eisini enn meira minkað, sigur Janus Petersen.

So talan er um, at kreppan í USA setti gongd í ein negativan spiral, sum er ógvuliga torførur at steðga aftur og sum hevur kravt, at statir og lond hava verið noydd at gera bjargingarpakkar fyri at steðga hesi gongdini.

### Vara okkum fyri tosi

Sagt verður, at føroyski búskapurin er ógvuliga viðbrekin, og soleiðis er tað eisini.

- Vit vita sum føroyingar, at tað gongur bæði upp og niður í Føroyum, og tað kann ganga ógvuliga skjótt, sigur Janus Petersen.

Hann heldur, at tað í løtuni ikki eru so nógv føroysk viðurskifti, sum eru avbjóðingin hjá Føroyum, men meiri tann altjóða búskapurin, sum er á veg skeiva vegin. Har er eingin vøkstur, kanska tvørtur ímóti eitt fall í búskapinum.

- Og tað kann ávirka okkum, tí at tað kann ganga út yvir eftirspurningin eftir okkara vørum og út yvir fiskaprísir og annað, so talan er um óhepnar umstøður. Hinvegin haldi eg sjálvur, at umstøðurnar her heima eru ikki verri, enn tær hava verið aðrar tíðir, sigur forstjórin í Føroya Banka.

Hann sigur, at hóast tos um trupulleikar í fiskivinnuni, so eru teir ikki størri, enn vit ofta áður hava sæð.

